# Ritt vitjaði Frem

Síðani væl kenda Ritt Bjerregaard úr danska javnaðarflokkinum gjørdist yvirborgarstjóri í Keypmannahavn tann 1. januar í 2006, hevur hon brúkt hvønn mikudag til at fara runt í kommununi fyri at vita hvat rørir seg. Leiðslan og venjarin hjá Frem vístu Ritt Bjerregaard runt á leikvøllinum, og á venjingarøkinum hjá Frem. Yvirborgarstjórin var hugtikin av teimum nýggju graslíkisvallunum, sum Frem hevur á sínum venjingarøki. Ritt heilsaði eisini uppá spælarnar hjá Frem. Hon hevði nøkur góð orð til Atla Danielsen, Jón Róa Jacobsen og hinar spælarnar í Frem, og minti teir á, at teir hava fyrr víst, at teir kunnu reisa seg aftur. Ritt spurdi spælarnar, um teir høvdu nakað ímóti at taka eina felagsmynd saman við henni, og tað var eingin trupulleiki.



# Liverpool vøllur bíðar

Í fleiri ár hevur verið arbeitt við ætlanum um at gera nýggjan leikvøll til Liverpool, men nú eru hesar ætlanir enn einaferð útsettar. Stóra óvissan á fíggjarmarknaðunum hava við sær, at leiðslan í Liverpool hevur lagt ætlaninar um bygging av nýggjum leikvølli til viks fyribils. Stjórin í Liverpool, Rick Parry, sigur, at tað er ov trupult at fara undir eina stóra bygging, sum støðan er í búskapinum í løtuni.

# Upp og niður hjá ÍF Føroyum

**Besta mansliðið hjá fótbóltsútisetunum er í niðurflytingarvanda, og tað sama eru kvinnurnar. Hini bæði mansliðini hjá ÍF Føroyum hava møguleika fyri uppflyting**



*ÍF Føroyar hevur sera nógv og gott fólk í løtuni, og tí er tað bara ein spurningur um tíð, áðrenn besta mansliðið fær næsta sigurinm*

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

1. lið hjá ÍF Føroyum spældi javnleik 2-2 ímóti Olympia á Kløvermarkini í gjár. ÍF Føroyar var á odda bæði 1-0 og 2-1, men fáar minuttir fyri leiklok javnaði Olympia og soleiðis misti ÍF Føroyar tvey stig.

ÍF Føroyar spældi serstakliga væl og munurin liðanna millum var so eyðsýndur sum sjáldan áður. Málmøguleikarnir vóru nógvir, men neyvleikin vantaði og tískil fekk ÍF Føroyar ikki fleiri mál enn tey bæði, ið Erling Fles og Pætur Dahl hvør í sínum lagi syrgdu fyri.

Hinvegin hevði Olympia at kallað ongar kjansir, og tí kendist tað næstan sum rán á alljósum degi, tá teir skoraðu til 2-2.

Stigið ÍF Føroyar fekk við javnleikinum er sjálvsagt kærkomið, men trý stig høvdu fjálgað enn meiri hjá útisetunum, sum eru í vanda fyri at flyta niður úr Seriu 1. Enn er liðið tó so mikið væl fyri, at tað kann avgera lagnuna sjálvt.

## Vunnu 11-0

Hjá 2. liðið er tað eitt sindur hugaligar. Teir spæla í Seriu 3 og vunnu ikki minni enn 11-0 á Olympia. Sonni Johansen gjørdu trý mál, Carl Herup Høgnesen og Rógvi Arge hvør síni tvey, meðan Henry Petersen, Rói Olsen, Tróndur Petursson og Regin Thomsen fingu eitt mál í part.

Komandi vikuskiftið spælir 2. lið hjá ÍF Føroyum ímóti Skovshoved. Vinnur liðið henda dystin, skal ÍF Føroyar spæla play-off dyst um uppflyting í Seriu 2.

## 3. lið í Seriu 3

Eisini 3. mansliðið hjá ÍF Føroyum hevði ein góðan dag í gjár. Her gjørdist talan um 4-2 sigur á GVI. Hans Petur í Brekkunum gjørdi tvey mál, og Eilev Sivertsen og Pætur Jacobsen hvør sítt.

3. lið liggur næstfremst í Seriu 4 og tað merkir, at vinnur liðið teir báðar dystirnar, ið eftir eru, so flytir liðið upp í Seriu 3.

## Kvinnurnar vunnu

Kvinnuligu útisetarnir hava eisini eitt fótbóltslið. Hesar vóru í dag ógvuliga vælmannaðar og vunnu 3-0 á VLI. Málini gjørdu Halltóra Joensen, Ása á Neystabø og Tanja Poulsen. Kvinnuliðið hjá ÍF Føroyum liggur næstaftast í síni deild, og stríðist fyri at sleppa undan niðurflyting.

# Hugsið nógv størri

MEINING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Leygardagin upprann so dagurin, sum frælsa ítróttin hevur bíðað eftir nú í meira enn eitt ár.

Við allari æru fyri tí megnar arbeiði, sum toftamenn framdu, tá teir fingu stadion til frælsan ítrótt gjørt í 1989, so hevur eitt stadion av hesum slagnum vanta í meginøkinum øll árini síðani hetta.

Uttan eitt slíkt stadion í meginøkinum hevur verið sera tungt hjá frælsu ítróttini at skapa neyðuga fundamentið fyri framdrift, og hóast vit í dag síggja nøkur sera evnarík ungfólk vinna seg upp ígjøgnum røðirnar, so hevur føroyska elitan fyrst og fremst verið sett saman av fólki, sum hava fingið alsk til hesar ítróttirnar, tá tey í lestrarørindum hava verið uttanlands.

Men enn er so langt ífrá komið á mál. Tað kann ikki sigast ov ofta, at skulu vit veruliga skapa karmar fyri einum elituumhvørvi innan føroyskan ítrótt – ikki bara frælsan ítrótt – so er neyðugt við einum veruligum ítróttardepli.

Seinastu nógvu árini hevur Tórshavnar Kommuna brúkt tíggjutals milliónir til at útbyggja ítróttafasilitetir. Og verður ein komandi umbygging av høllini á Hálsi og komandi fimleikahøllin við Tórsvøll roknað við, eru tølini so væl og virðiliga trísiffrað.

Og spurningurin er, um hetta ikki varð betur nýtt við einum veruligum depli. 50 metur hylur, styrkivenjingarhøli og hallir til borðtennis, flogbólt og annað ljóðar kanska ógvusligt.

Men kostnaðurin hevði neyvan verið nógv meira enn tað, sum longu er nýtt, tá ætlaðu ígongdverandi útbyggingarnar eru gjørdar. Og fyri fólkaheilsuna hevði vinningurin helst verið fleirfaldaður íløguna.

Varð depilin lagdur sum forleingjan av svimjihøllini, kundi hesin hóskandi hýst øllum virkseminum hjá ÍSF. Ein tunnil kundi ferðslutrygt og ómaksleyst givið skiftiog venjingarfasilitetir til frælsu ítróttarfólkini, og sjálvandi kunnu allar aðrar ítróttir eisini fáa vinning av eini veruligari frælsisbreyt.

Svakligt og kostnaðarmikið vildi kanska onkur sagt. Ja. Men tey svøku fólkini eru við hvørt tey, sum gera ein mun, tá avtornar, sigst.



*Jákup Mørk heldur tað vera upp á tíðina at byggja eina 50 metra svimjihøll*

VB-Stjørnan 20-28 (9-13):

# Stjørnan ov sterk

**Fyrsta royndin hjá VB at bjóða av miseydnaðist fullkomuliga, tá Stjørnan undirstrikaði sína støðu sum FM-favorittur**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá kappingarárið endar við FM-finalu, ber sjálvandi illa til longu nú at geyla nakað lið upp til FM-favorittt.

Men Sjørnan setti í gjár eina tjúkka striku undir, at tær heilt víst ikki fara at forera nakað sum helst burtur í ár.

VB hevur í fleiri ár átt eitt av sterkastu hondbóltsliðunum í landinum, og í mun til undanfarin ár tykist hópurin nakað breiðari nú.

Men hetta munaði tó lítið móti Stjørnuni, sum frá fyrsta bríksli setti seg á dystin sunnudagin. Við buldur og braki vunnu tær sær eina fimm-mála leiðslu mest sum alt fyri eitt, og tann munin megnaði VB ongan tíð veruliga at kvetta tað allar minsta niður.

Tað er hugsandi, at hetta eisini er úrslit av drúgvu fyrireikingunum, sum Stjørnan hevur havt til Europa-Cup, og at tær tí eru sterkari kropsliga enn hini liðini. Men tað setir enn eina ferð stjørnuna í fremstu røð, har tær eru liðið, sum hini skulu vigast ímóti, um vónirnar skulu vera til metal úr finasta slag.

## FAKTA um dystin

**VB-Stjørnan 20-28 (9-13)**
**10 min:** 3-4
**20 min:** 3-9
**40 min:** 11-20
**50 min:** 17-24
**Málskjúttar:**
**VB:** Daiva Toumaite 7(2), Bára Mortensen 6, Lina Andriulytw 2(1), Gurið Mortensen 2, Rannvá Augustinussen 1, Laila Jespersen 1, Una Egilsdóttir 1
**Stjørnan:** Durita Christophersen 9(3), Simona D. Petersen 5, Una Olsen 4(1), Dianne Møller 3, Bára S. Klakstein 2, Anna Kristina samson 2, Durita Ljósstein 2, Judith Hansen 1
**Brotskøst:** VB 4, Stjørnan 5
**Útvísingar:** VB 3, Stjørnan 3
**Dómarar:** Ragnar Simonsen & Rúni Mohr